# Ein føroyskur Jesus á lørifti

**Føroyingar fáa nú høvi at síggja ein film við føroyskari talu um Jesus. Ein stór verkætlan, har umboð fyri ymiskar samkomur hava luttikið, er komin á mál. Filmurin verður almannakunngjørdur í næstu viku**

FILMUR
*Ingi Rasmussen*
*ingi@sosialurin.fo*

Nú fáa føroyingar sín egna film í fullari longd um Jesus. Týsdagin í komandi viku verður filmurin almannakunngjørdur við eina samkomu í Norðurlandahúsinum og kunnað verður um verkætlanina.

Jesus-filmurin er upprunaliga frá 1979, og upptøkurnar eru gjørdar í Ísrael. Filmurin er tveir tímar langur og hevur føroyska talu. Føroysku røddirnar eru millum annað kend fólk úr fjølmiðlaheiminum og úr leiklistini.

Poul Johan Djurhuus, formaður í Umboðsráðnum fyri Jesus-filmin, sigur endamálið við filminum vera at siga frá søguni um Jesus. Hann er væl egnaður í kristiligu boðanini og sum frálærutilfar í kirkjum, kristiligum samkomum og felagskapum og skúlum. Bæði fyri ung og eldri.

Filmurin byggir á Lukas evangelium. Hann er týddur til fleiri enn 800 mál, og nú eru røddirnar so samskipaðar á føroyskum eisini. Ein serlig útgáva av filminum er saman við frálærutilfari á føroyskum gjørd til skúlabrúks.

Føroyska verkætlanin er úrslit av goðum samstarvi milum umboð fyri kirkjur, kristiligar samkomur og felagsskapir í Føroyum. Tey hava skipað seg í eitt Umboðsráð við fólki úr fólkakirkjuni, brøðrasamkomuni, hvítusunnusamkomuni, katólsku kirkjuni, adventistakirkjuni, samkomuni Immanuel, Frelsunarherinum, meinigheitini í Hoyvík og kirkjuligu heimamissiónini.

# Avgerð um læknateldur útsett

**Síðst í november fær Tórshavnar býráð svar uppá, hvørji krøv verða sett til eina telduskipan, ið skal samskifta við heilsuverkið. Hólmgongan millum læknarnar í Havn um eina telduskipan er tí helst útsett eina tíð**

TELDUSTRÍÐ
*Ingi Rasmussen*
*ingi@sosialurin.fo*

Síðst í november hevur ein serfrøðingabólkur undir Heilsumálaráðnum útgreinað, hvørji krøv skulu setast til framtíðar teldukervið í sjúkrahúsverkinum, segði Bill Justinussen, landsstýrismaður, við Jan Christiansen, borgarstjóra, á fundi teirra millum mikudagin.

Býráðið í Havn stendur fyri at taka avgerð um, hvørja skipan kommunulæknarnir skulu hava, og tað hevur givið høvuðbrýggj. Tvær býráðssamtyktir siga, at skipanin skal samskifta við allar heilsustovnar. Tveir læknar hava roynt eina íslendska skipan, sum teir eru nøgdir við, men hinir læknarnir vilja heldur hava eina danska skipan. Nú bíðar borgarstjórin eftir, hvat heilsuverkið kemur til síðst í november.

– Serfrøðingarnir kanna, hvørjar skipanir í Norðurlondum best nøkta okkara tørv, og vónandi fáa vit sagt við tey, sum skulu vera partar av skipanini, hvørja skipan vit fara at velja, sigur Bill Justinussen.

Eitt avgjørt krav verður, at skipanirnar skulu samskifta, og Bill Justinussen viðgongur, at helst verður talan um eina journal fyri hvønn sjúkling, men hann undirstrikar, at tað enn ikki er viðgjørt politiskt.

Tað er annars tankin um eina sentralskrá, sum ræðir fleiri kommunulæknar í Havn. Trygdin er best, um upplýsingarnar eru í varðveitslu hjá einstaka kommunulæknanum, halda fleiri. Aðrir halda, at upplýsingarnar eru best tryggjaðar í eini og somu teldu.

# Læknaloysnir uttan privatisering

**Privatisering av føroysku kommunulæknunum kemur ikki upp á tal, sigur Bill Justinussen, men arbeitt verður við fleiri øðrum loysnum á læknatrupulleikanum. Vaktarskipanin skal broytast, søkt verður eftir læknum aðrastaðni, fleiri skulu útbúgvast og eldri læknar fáa serlig arbeiðskor**

LÆKNATROT
*Ingi Rasmussen*
*ingi@sosialurin.fo*

Familju- og heilsumálaráðið arbeiðir við fleiri loysnum fyri at loysa akutta trupulleikan við kommunulæknum, sum eru ovbyrjaðir. Men at gera læknarnar til privatar vinnurekandi, sum teir eitt nú eru í Danmark, er ikki ein partur av nakrari ætlan.

– Tað er ikki aktuelt at privatisera læknarnar, og tað haldi eg heldur ikki vera skilagott, sum støðan er nú. Tað er næstan bara Havnin, sum er áhugaverd í so máta, men ein privatisering bara í einum øki hevði skapt ójavnar í skipanini, sum ikki høvdu gjørt hana lættari at umsita. Føroyar eru ov lítlar til privatisering, sigur Bill Justinussen, landsstýrismaður við familju- og heilsumálum.

## Nýggj vaktarskipan

Í Føroyum eru færri læknar fyri hvønn íbúgva enn aðrastaðni. Í Danmark skulu vera hægst 1600 fólk fyri hvønn lækna. Í ávísum støðum í Føroyum er trýstið mangt slíkt. Í Klaksvík eru bara tveir fastir læknar til 6000 fólk, og annar læknin hevur sagt upp. Í Havn eru minst 2000 fólk fyri hvønn lækna, og tveir hava sagt upp.

Bill Justinussen sigur, at tey hava ásannað trupulleikan í Familju- og heilsumálaráðnum og arbeiða við fleiri loysnum at lætta um læknabyrðuna og fáa fleiri læknar settar í starv.

Tann broytingin, sum liggur fremst fyri, er ein umskipan av vaktarskipanini, so læknarnir arbeiða minni. Ætlanin er, at taka mørkini burtur millum læknadømini, so tað ikki sita fimm læknar á vakt samstundis í meginøkinum. Tað kundi verið gjørt til, at ein lækni hevur vaktina við einari bakvakt, heldur landsstýrismaðurin.

– Tann ætlanin er komin so langt áleiðis, at hon kann setast í verk, tá nýggi bygningurin hjá Landssjúkrahúsinum letur upp í vár, sigur Bill Justinussen.



*Eldru læknarnir skulu hava serligar treytir, so teir halda longri á, sigur Bill Justinussen*

*Mynd: Maria Olsen*

## Søkja aðrastaðni

Higartil hevur verið søkt eftir læknum í londunum kring okkum, har tey eisini hava læknatrot. Tað hevur ikki givið størvegis úrslit, og Bill Justinussen sigur, at tey ætla at royna aðrar leiðir eftir læknahjálp.

– Higartil hava vit mest søkt í Danmark og Svøríki, men tað fara vit at víðka til eisini at søkja í Íslandi og Týsklandi, har tey hava yvirskot av læknum í hesum døgum. Trupulleikin hevur verið, at læknarnir skulu vera góðkendir av Sundhedsstyrelsen og skulu hava arbeiðs- og uppihaldsloyvi. Vit fara at royna at gera ta prosessina lagaligari, sigur Bill Justinussen.

Hann roknar kortini ikki við, at farið verður longri burtur í fjarskotin lond eftir læknum, tí tað hevði givið trupulleikar.

– Tess longri burtur vit koma, tess størri gerst málsliga forðingin, og málsligt samskifti er eitt týdningarmikið amboð hjá fólkum í primeru heilsutænastuni. Vit noyðast tí at finna læknar onkustaðni í nærumhvørvinum, sigur Bill Justinussen.

## Eldri sertreytir

Nógvir av kommunulæknunum í dag eru um tey 60 árini. Teir eru ovbyrjaðir av tungu arbeiðsbyrðuni, og fleiri umhugsa tí at fara úr starvi í úrtíð. Bill Justinussen sigur, at arbeitt verður við at gera eina serliga senior-skipan, ið kann lætta um hjá teimum eldru læknunum, so teir halda longri á.

– Vit mugu gera tað eitt sindur meiri lokkandi fyri eldru læknarnar at halda fram í nøkur ár í staðin fyri at gevast. Vit kundu givið teimum nakrar serliga treytir. Tað kundi verið við at bjóða teimum meira frítíð og givið teimum ein vanligan arbeiðsdag uttan vaktir, sum onnur fólk hava, sigur Bill Justinussen.

Hvussu er og ikki, so fer ein eldrabumba at raka læknaøkið nakað skjótt, um einki verður gjørt. Fleiri nærkast pensjónsaldrinum, og tí mugu yngri læknar standa klárir at taka við.

Landsstýrið hevur hækkað játtanina á komandi fíggjarlógini til útbúgving av kommunulæknum. Játtanin er hækkað úr einari upp í 2,3 millónir krónur.

– Í 2005 eru fyrstu læknarnir liðugt útbúnir til kommunulæknar, og málið er at útbúgva tveir afturat um árið, sum so eru klárir at taka yvir, tá eldri læknarnir leggja frá sær, sigur Bill Justinussen.





*Bergur í Garði ávarar ímóti ov stórum bjartskygni, nú Postverk Føroya skal leggast um til alment partafelag. Bremsilongdin er long, og veruleikin er, at vit í dag hava eitt rakstarhall á 8-9 mio. krónur, og ein umlegging av stovninum fer ikki av sær sjálvum at venda gongdini.*

*Mynd: Maria Olsen*

# Posturin langa bremsilongd

**Bergur í Garði ávarar ímóti ov stórum bjartskygni, nú Postverk Føroya skal leggast um til alment partafelag. Bremsilongdin er long, og veruleikin er, at vit í dag hava eitt rakstarhall á 8-9 mio. krónur, og ein umlegging av stovninum fer ikki av sær sjálvum at venda gongdini. Til tað krevst torførar avgerðir, sigur postverksstjórin**

POSTVERK FØROYA
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Á fíggjarlógaruppskotinum fyri 2004 hevur landsstýrið sett pening av til at umskipa Postverk Føroya til eitt alment partafelag. Ætlanin at umskipa postverkið verður javnan havd á lofti, men nú tykist sum um, at landsstýrið ætlar at taka avgerandi stigið, og fremja ætlanina í verki.

Postverk Føroya hevur seinnu árini havt stórt rakstrarhall, og ætlanin at gera stovnin til alment partafelag er liður í at nútímansgera postverkið, so stovnurin fær betri møguleikar at venda gongdini.

Endamálið er, at Postverk Føroya í framtíðini skal rekast eftir vinnuligum fortreytum, sum skal bera seg fíggjarliga. Stjórin í Postverko Føroya, Bergur í Garði ávarar kortini ímóti ov stórum bjartskygni.

– At umleggja postverkið til eitt alment partafelag er ikki nakað universalt middel í sær sjálvum. Vit hava eitt rakstrarhall á 8-9 mio, og tað fer at krevja torførar avgerðir og broytingar fyri at venda tí. Við umleggingini fáa vit størri frælsi at taka stig, vit ikki kunnu í dag. Vit mugu eisini gera okkum greitt, at bremsilongdin er long, og hóast eina umlegging, so verður tað ikki lætt at venda gongdini, sigur Bergur í Garði.

## Gomul lóggáva

Postverksstjórin tekur undir við ætlaninum hjá landsstýrinum. Hann heldur tað er ógvuliga týdningarmikið, at stovnurin verður skipaður øðrvísi í framtíðini, um rakstrarhallið skal vendast.

Postverkið arbeiðir í dag eftir eini lóg frá 1976, og síðan hava stórar broytingar verið í føroyska samfelagnum, uttan at Postverk Føroya hevur fylgt við. Bergur í Garði vísir á, at lóggávan á postverksøkinum er frá, tá føroyska samfelagið hevði lítlan og ongan infrastruktur og bygdir vóru uttan vegasamband. Tað kann ikki verða nøktandi at arbeiða undir slíkur fortreytum, sigur hann.

Bergur í Garði er sannførdur um, at rættast hevði verið at rikið postverkið eftir vinnuligum fortreytum, har stovnurin kann taka avgerðir uttan at taka politisk fyrilit.

– Stovnurin eigur í framtíðini at verða rikin á vinnuligum fortreytum, har prísirnir verða settir meira rationelt, enn teir verða í dag. Verður endaliga stigið tikið politiskt, so er týdningarmikið, at umskipanin verður gjørd ordiliga. Vit eru seinasta postverkið, ið ikki verður rikið vinnuliga, og skal ræðisrættur og ábyrgd fylgjast, so má umleggingin gerast, sigur postverksstjórin.

## Samsvarar ikki

Á fíggjarlógaruppskotinum fyri 2004 stendur landið til rinda 32. mio krónur í partapeningsinnskoti í Postverk Føroya. 36 mio. krónur er settar av til íløgur, so játtanin komandi ár javnvigar ikki. Postverk Føroya er í dag niðurslitið og stórur tørvur er á íløgum, so stovnurin fer at megna at taka ímóti nýggju avbjóðingunum, sum eru fyri framman.

Á íløgusíðuni metir postverkið, at tørvur er á 18 mio. krónur til ábøtur av bygningunum kring landið. Góðar 14 mio. skulu nýtast til tekniskan umbúna, og aðrar fýra milliónir til umskipanir og íløgur.

Landsstýrismaðurin í vinnumálum, Bjarni Djurholm segði við Dimmalætting fyrr í vikuni, at hann var fullgreiðir yvir, at tølini ikki samsvara, og vísti á, at talan er bert um fyribils tøl.

## Færri deildir

Í viðtalu við Dimmalætting var Bjarni Djurholm fámæltur, tá hann varð spurdur um hvørjar broytingar verða við postverkinum, nú stovnurin skal tillagast til alment partafelag.

Postverksstjórin er eisini fámæltur. Hann sigur, at væntandi verða færri deildir kring landið. Stovnurin hevur áður gjørt politiska myndugleikan varugan við ynski um færri deildir, men av politiskum áðum hevur ætlanin ikki verið møgulig at framd í verki.

Við at stovnurin sleppur úr politiska haftinum og fær størri frælsi, gevur nýggjar møguleikar. – Verður stovnurin gjørdur til alment partafelag fer tað geva postverkinum eitt nýtt perspektiv bæði fyri kundan og sjálvan stovnin, sigur Bergur í Garði at enda.